# Skúlastýrisfundur

Dato: 06.11.2012

Tíð: 17.00 – 18.30

Til staðar: Eyðun Lisberg, Tórarinn á Rípuni, Jórun Simonsen, Magnus Svarthamar, Martin Petersen, Anna Vang og Høgni Warberg

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1: Gerðabókin
2: Felags foreldratiltakið týsdagin 20. november
3: Ymiskt

Att 1: Fundarfrágreiðing frá seinasta fundi góðkend

Att 2: Skráin til felags foreldratiltakið týsdagin tann 20. Nov 2012 var umrødd. Avgjørt varð, at tiltakið/fundurin byrjar kl. 18.30 við at Eyðun Lisberg, skúlastýrisformaður leggur fram ársfrágreiðingina hjá skúlastýrinum. Kl. 18.45 greiðir Høgni Warberg, skúlaleiðari frá virksemi skúlans. Kl. 19.00 verður stuttur foreldrafundur inni í ymsu flokksstovunum, har m.a. foreldraumboð verða vald. Kl. 19.30 heldur Jóhannes Miðskarð almennan fyrilestur um samstarvið millum skúla og heimini, og uml. kl. 20.15 verður kjak og møguleiki at seta spurningar. Tiltakið verður lýst við at senda skriv út til foreldrini og umvegis heimasíðurnar hjá skúlanum og kommununi.

Att 3:
Tosað varð um, at fáa "rutsjibanan og grulvigarðin" til svimjihylin upp.

Núverandi skúlastýrið mælir til, at nýggja skúlastýrið skal:

- arbeiða víðari við ætlanum at skipa fyri einum garðdegi, har arbeitt verður við at menna skúlaøki. Í hesum sambandi skal Høgni royna at fáa til vega tekningar og ætlanir sum fyrr eru gjørdar um skúlaøki.
- at fáa gjørt virðisgrundarlag fyri Kvívíkar skúla. Høgni hevur gjørt eina fyribils orðing, sum tað kann arbeiðast víðari við.

Vegna skúlastýrið
Høgni Warberg, Skrivari